Undirvísingar- og Mentamálastýrið

# Málsviðgeri

**Starvið**
Í sambandi við at eitt av starvsfólkum okkara er farið í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum málsviðgeri leyst at søkja á próvstovuni.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a. at:
- Málsviðgera
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur á próvstovuni (innstilling til próvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a.)
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera próvtøkuuppgávur klárar til prentingar (skriva tekstir, gera uppseting (lay-out) o.a.)
- Prenta, pakka og senda próvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til próvstovuna (t.d. samskifti við próvdómarar o.o.)
- Avgreiða samsýning fyri próvdøming

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjari hevur:
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovuyrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv (Windows, Word, Acces, Excel, PowerPoint, PageMaker og PhotoShop)
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Skal kunna arbeiða undir tíðartrýsti

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 12. lønarflokki.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalstýrið og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. august 2000 kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Bjarna Wilhelm, fíggjarfulltrúa í Undirvísingar- og Mentamálstýrinum, tlf. 355050

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Í aðalstýrinum*** *eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.*
***Próvstovan,*** *sum er í fyrisitingarpartinum av stápinum, hevur til uppgávu at umsita tey praktisku viðurskiftini próvtøkuni viðvíkjandi so sum gerð og prenting av próvtøkuuppgávum og annars at samskifta við uppgávunevndir, próvdómarar og skúlar.*

## Almenn skeið á Fróðskaparsetri Føroya 2000–2001

*1) Próvskeið í føroyskum*

Skeið fyri tey, ið hava føroyskt sum móðurmál,
byrjar *á Føroyamálsdeildini* 11. september í einum flokki við undirvísing mánadag og mikudag, báðar dagar kl. 16.15-18.30.

Lærari: Ása Magnussen

*2) Próvskeið í enskum*

a) Skeið til Cambridge First Certificate in Advanced English
byrjar á *Føroyamálsdeildini* 14. september í einum flokki við undirvísing hósdag kl. 13.00-16.00.
Fortreytir: Miðnámsstøði A/B ella samsvarandi kunnleiki, eitt nú Cambridge FCE-royndin, førleiki í at nýta málið, talað og skrivað.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

b) Skeið til Cambridge Certificate of Proficiency in English byrjar *á Føroya Landsbókasavni* 13. september í einum flokki við undirvísing mikudag kl. 9.00-12.00.
Fortreytir: Staðið »Advanced English«, málsligtstudents-, HF-, HH-prógv ella samsvarandi, góðan førleika at nýta málið.

Lærari: Sharon Christiansen, MA.

Próvtøkurnar verða í mai/juni 2001.

Nágreiniligari upplýsingar og tilmeldingarbløð eru at fáa á setursskrivstovuni. Tilmeldingarfreistin er sett til **18. august 2000**. Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, sohvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult. **Tilmeldingargjaldið er 550 kr.**

Fyri próvtøku í føroyskum gjalda næmingar 300 kr.

Fyri próvtøku í Advanced English gjalda næmingar 800 kr. og fyri próvtøku í Proficiency 900 kr.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan, tlf. 315302
Handan Á 5, 100 Tórshavn


**Perlan í SMS søkir eftir fólki**
**- at byrja skjótast til ber - vit sóknast eftir:**

KOKS · ella KAFETERIA ·
ASSISTENTI
og LÆRLINGI

Ert tú fryntlig/ur, smílandi og dámar at hava við fólk at gera, hava vit eitt spennandi starv til tín á einum lívligum arbeiðsplássi, har nakað hendir alla tíðina.

Vit vænta av tær, at tú kanst arbeiða skiftandi tíðir, ikki ert bangin fyri at taka ábyrgd og klárar at arbeiða undir trýsti. Eisini verður stórur dentur lagdur á at reinføri í Perluni alla tíðina er í topp.

Íbúð kann møguliga útvegast.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Hans ella Tóru.

Matstovan fyri alla familjuna
Perlan
Postboks 1245 • 110 Tórshavn • TLF. 315061



ftrihjáp
tiPruníM

**Perlan í SMS søkir eftir fólki til ymiskt fyrifallandi arbeiði - at byrja skjótast til ber.**

Ert tú fryntlig/ur, smílandi og dámar at hava við fólk at gera, hava vit eitt starv til tín á einum lívligum arbeiðsplássi, har nakað hendir alla tíðina.

Vit vænta av tær, at tú kanst arbeiða skiftandi tíðir, ikki ert bangin fyri at taka ábyrgd og klárar at arbeiða undir trýsti. Eisini verður stórur dentur lagdur á at reinføri í Perluni alla tíðina er í topp. Møguleiki er eisini at arbeiða niðursetta tíð.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Hans ella Tóru.

Matstovan fyri alla familjuna
Perlan
Postboks 1245 • 110 Tórshavn • TEL 315061



ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA




## Vilt tú hjálpa við at stuðla nýggjum spennandi verkætlanum í Norðurlondum?

Nú er stundin komin at senda inn umsókn um stuðul til norðurlendskar mentanarverkætlanir, sum í minsta lagi skulu umfata trý norðurlond/sjálvstýrandi øki.

Nærri kunning, umsóknarbløð og leiðbeining fært tú við at venda tær til okkara á skrivstovuni hjá mentanargrunninum í Keypmannahavn.

Tú kanst eisini vitja heimasíðu okkara, har tú kanst lesa meira um arbeiði okkara og hvørjum verkætlanum, vit stuðla.

Umsóknarbløð fáast við at skriva ella ringja ella prenta út frá heimasíðu okkara. Allar umsóknir, ið eru poststemplaðar í seinasta lagi 15. september 2000, eru við í endaligu viðgerðini í desember mánaði.

POHJOISMAINEN KULTTUURIRAHASTO
Store Strandstræde 18,
DK-1255 København K, Danmark
Telefon +45 33 96 02 00, e-post: kulturfonden@nmr.dk
web: www.nordiskkulturfond.dk

## SPEDITØR-NÆMINGUR
### TIL SMYRIL LINE CARGO, HEDEHUSENE, DK.

***Starvið:***
Tú fært eina fjølbroytta lærutíð, har tú fært høvi til at royna teg í øllum deildum á virkinum. Vit eru eitt ungt lið. Vit hava nógv at gera, og okkum nýtist eitt fólk, sum er opið, og sum dámar at hava ordan í tingunum.

***Vit vænta, at tú:***
* hevur lokið HH-prógv
* hevur góðan málkunnleika
* dugir at hugsa sjálvstøðugt
* ert í góðum lag
* gongur inn fyri sølu og service
* hevur yvirlit og áhuga fyri tí tú tekst við
* ert smidligur og samstarvsfúsur

***Vit bjóða:***
Eitt spennandi lærupláss í einum andkveikjandi liði við røskum liðfeløgum, men við einum stuttligum og løttum tóna.

Hevur tú hug til at søkja starvið, send so eina umsókn áðrenn 11.08.2000 við viðløgdum c.v. til:

Smyril Line Cargo
Jónas Broncksgøta 35
FO-110 Tórshavn • P.O. Box 370
Tel 345900 • 345952 • Fax 345952
www.smyril-line.fo • e-mail: cargo@smyril-line.fo

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
www.smyril-line.fo e-mail: cargo@smyril-line.fo


Gravsteinar og kantsteinar.
Nú eisini úr føroyskum gróti

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo
Sosialurin - 311820



JAN KETIL PRESENTERER




**Fyri fyrstu ferð í Føroyum**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadagin | 4. aug. | kl. 19.00 |
| Leygardagin | 5. aug. | kl. 15.00 og 18.00 |
| Sunnudagin | 6. aug. | kl. 15.00 og 18.00 |

**Teltið verður sett upp á Sandvíkahjalla, við síðuna av Vøruhúsinum á Hjalla.**

*M.a. akrobatar, klovnar og kendi sjónleikarin Oddbjørn Hesjevoll*



VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.
HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.
GÓLV FRESING
GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.
GÓLV SLÍPING
FØROYA BETONG v/Hjaltur Tausen SAGING
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898
Sosialurin - 311820



PRENT?
…arbeiðsseðlar, álit, ársfrágreiðingar, ársroknskapir, blokkar, bløð, bóklingar, brævbjálvar, brævpappír, bøkur, faldarar, gávukort, gravsálmar, innbjóðingarkort, jólakort, klistrimerki, kvittanir, listabøkur, lógarsøvn, lutaseðlar, mappur, orðabøkur, plakatir, postkort, príslistar, produktbløð, putlispøl, rokningar, sanghefti, skreytbløð, takkarkort, visittkort (og nú er tíverri onki plás eftir, ring og spyr)…
Spf. HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo


Halt sosialin